# Heimsins størsta jólaskrúðgonga!

Eitt tað størsta jólaátakið í heiminum er í avstralska býnum, Adelaide, sum er høvuðsstaður í statinum South Australia. Fólkatalið í Adelaide er 1.138.000 fólk. Býurin var stovnaður 28. desember í 1836. Jólasiðurin, sum er sera væl umtóktur í er "The Adelaide Christmas Pageant. Talan er um eina jólaskrúðgongu, sum er tann størsta av sínum slagi í heiminum. Skrúðgongan fevnir um meiri enn 400.000 fólk. Fyrsta skrúðgongan var í 1933. Skrúðgongan byrjar vanliga ein leygardag í november. Hetta verður gjørt fyri at undirstrika, at nú stundar til jólahátíðina. Í skrúðgonguni eru klovnar, hornorkestur, harmoniorkestur, dansibólkar, og fólk sum framføra okkurt meðan tey ganga í skrúðgonguni. Síðstur – og hæddarpunktið – í skrúðgonguni er Father Christmas – Jólamaðurin. Tá skrúðgongan er liðug fer Jólamaðurin, og tekur sess í "The Magic Cave" – Gandahellinum – og har kemur so ein ørgrynna av børnum fyri at heilsa uppá hann. Líknandi jólaskrúðgongur verða eisini hildnar í smærri býum í South Australia.






















